## DAGSINS MEINING

# Breiðar semjur?

Løgmaður hevur fingið sær til fastan sið í hvørji ólavsøkurøðu síni at koma við landsfaðirligum formaningum og áheitanum á samgonguflokkar eins og á andstøðuflokkar. Hetta riggar altíð væl. Hetta gevur fatan av fólkaræðiligum hugsunarhátti. Í ár var tað so tær breiðu semjurnar, sum vóru á lofti. Løgmaður lovaði at byggja sóin politikk á breiðar semjur á tingi. Hetta kann bert merkja, at hann sigur seg vilja samstarva við andstøðuna ella við partar av henni. Nú verður so endi á tí meirilutaræði, sum vit hava havt nú í fimm ár. E eingin skal nú ivast í, at løgmaður gongur inn fyri fólkaræði, ið sum kunnugt er samstarv tvørtur um floksmørk og samgongumørk. So vítt so gott. Soleiðis eigur tað at vera.

Men hvør er so veruleikin, tá tað kemur til at fremja tey føgru orð í verki? Tað skerst ikki burt, at líta vit at politiska veruleikanum hesi fimm árini fáa vit tíverri eina heilt aðra mynd, ið stendur í andsøgn til føgru orð løgmans. Higartil hava at kalla øll stór mál verið trumfað ígjøgnum løgtingið við einum lítlum meriluta, uttan at andstøðan hevur havt tað minstu ávirkan á úrslitið. Heldur verður fólkið eftirspurt við t.d. fólkaatkvøðum. Talan er mangan um mál, ið viðkoma øllum landsins borgarum. Vit kunnu nevna blokkin og yvirtøkurnar, grundlógarmálið og mong onnur mál. Tað er als einki at ivast í, at var tað so, at løgmaður ynskti at fremja stór mál á breiðum grundarlagi, so bar hetta til. Men hetta vildi kravt, at ein setti seg við samráðingarborðið og tryggjaði andstøðuni, at hon fekk ávirkan á málini. Soleiðis verður ikki farið fram. Tvørturímóti, so verða málini bókstaviliga koyrd ígjøgnum løgtingið uttan, at sjónarmiðini hjá andstøðuni verða tikin til eftirtektar.

Tað, sum vit hava upplivað hesi seinastu fimm árini, er, at sera stór og álvarsom mál verða avgjørd við einum sera teprum meiriluta á tingi. Ein lítl meiriluti ger suverent av, hvussu sera stór og týdningarmikil mál, ið viðkoma øllum fólkinum skulu avgerast. Hetta er kanska løgfrøðiliga í lagi. Men hetta er ikki moralskt og demokratiskt í lagi. Tað má tí vera skylda løgmans framyvir at lata síni føgru orð fáa fylgi av eins føgrum gerðum. Einki er so niðurbrótandi fyri álitið á ein politiskan leiðara, enn tá samanhang ikki er millum orð og gerðir. Tí má løgmaður í tí, sum eftir er av valskeiðinum, gera ein heilhjartaðan og álvarsaman innsats fyri at koma á tal við andstøðuna, soleiðis, at andstøðan eisini fær ávirkan á tær stóru avgerðirnar, sum fara at verða tiknar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ein stutt frágreiðing um málið um Jógvan S – fyrrverandi Ågot

**Rólant Poulsen**



Hetta skip varð útskift við nýggja Ågot og flutt til Noregs sambært skjal frá skipaskrásetingini, ið sigur:

**»Nr. 113 Strikað:**
Eftir fráboðan um avhending av skipi til útlandið, dagfest 15. november 2001 frá Sp/f Ågot, Skáltavegur 63, 700 Klaksvík, er hetta skipið eftir Bill of Sale frá 15. nov. 2001 selt til Langøy Kyst og Havfiske A/S, Langøyneset, 6530 Averøy, Norway.«

Sostatt er skipið við hesum strikað úr Føroya Skipaskráseting eftir § 26 stk. 1 í løgtingslóg nr.9 frá 5. mars 1970 um skráseting av skipum við meira. Tilm. 15. november 2001, nr. 450, skrásett 15. november 2001.

Tann, ið sigur, at hetta skip ikki er flutt av landinum, sigur ósatt.

Tá so landsstýrismaðurin, Jørgen Niclasen, krevur, at tann norski keyparin og tann føroyski seljarin skulu skriva undir, at hetta skip ongantíð aftur skal fiska undir føroyskum flaggi ella í føroyskum sjógvi, so taka hansara egnu embætismenn og skriva einum av hansara partamonnum tilsøgn um fiskiloyvi, uttan at landsstýrismaðurin er vitandi um tað. Gott hevði tí verið hjá Føroya fólki at fingið at vita, hvør hevur givið teimum boð um at skriva tilsøgn um fiskiloyvi dagin fyri valið.

Tí má tann vanligi føroyingurin standa spyrjandi. Og nú hóttir reiðarin á Jógvani S við at fara at kanna fiskiloyvir hjá 32 øðrum skipum. Ja, tað skal hann bara gera, tí tey flestu eru givin av fólkafloksmonnum til sínar egnu!

So tað hevði verið gott hjá fólki at fingið at vita, um sama mannagongd er brúkt at geva teimum fiskiloyvi – og sikkurt hevði verið lítið eftir av Fólkafloksmonnum til næsta val. Ja, hetta er eitt sera fløkt mál, og ikki minst, nú tú hevur givið fyribilsloyvi til Jógvan S.

So mítt ráð til Jacob Vestergaard er:

»Tak hatta loyvið aftur og lat teir, ið eiga fløkjuna, greiða hana sjálvir.«

# Tann óndi sirkulin

**Hans Birgir Hansen**

Størsti parturin, av øllum ættarliðum av føroyingum, er inni í tí ónda sirklinum, ið øll hava kring um seg. Slíkan havi eg brotið meg út ígjøgnum í Havn. Tað hevur verið við hjálp av lesarabrøvum í tíðindabløðum, ið hevur givið mær størri frælsi, rættindi og privatlívsfrið, ið áður hevur verið trakkaður undir fótum. Eg fáist við mangt og hvat fyrifallandi, ið ein greiðir í lesarabrøvum í tíðindabløðunum, og eg fegnist yvir tey góðu úrslit, ein fær við øllum fyritakssemi í dag. Tað er ótrúliga gott at kunna liva sjálvstøðugt lív og hava nógv fyritakssemi, arbeiði, frítíð, privatlív og loysa uppgávur, ið hava ligið á láni heima.

Eg havi nógv viðhaldsfólk, ið vilja hava ein til dansikvøld, fótbólt, rennikappingar og nógv ymisk tiltøk, ið ein fyrireikar seg til við tilrættisleggjan. Tað er nakað, ið ein hevur forsømt í eitt longri áramál, tá ið ein dagliga lá undir tíðartrýsti av óviðkomandi fólki, ið ein kallar arvafíggindar í dag.

Eg havi fingið nógv av skafti við hjálp av bløðum og hvat ein hevur viðgjørt í lesarabrøvum sæst í føroyskum og norðurlendskum fjølmiðlum. Tað er ótrúliga gott at hava arbeitt seg inn í sjálva kjarnuna og sett fingurin á pulsin hjá øllum, ið lesa míni mongu áhugaverdu lesarabrøv í dag. Eg havi skipað soleiðis fyri, at blaðlesarar og viðhaldsfólki, skulu kunna fylgja einum í øllum og nýta eins lívsroyndir og vitan eftir førleikaevnum.

Tað er ótrúliga gott at fylgja gongdini og staðfesta sín rættleika í øllum stríði, og framtíðarmetingarnar ganga allar út. Av hesum kennir ein tryggleikan. Eg havi gott bakland og gott støði at standa á eins og góðar stuðlar, ið hava lánt mær pening og fingið hendan aftur og tá ið ein hevur livað uppá borg. Tað skal komast víðari fram á míni lívsleið við at fáa spennandi og áhugaverdar ætlanir førdar út í tað dagliga gerandislívi hjá mær í Havnini. Eg kenni mína samfelagsskyldu at halda áfram í bløðunum við at kunna um fyritakssemi tá ið nógv hava áhuga at fregnast, hvat ið ein tekst við í dag.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Svenning Lindenskov gevst sum yvirvitapassari



31. juli 2003 fór Svenning Holm Lindenskov í Nólsoy frá sum yvirvitapassari á Borðuni. Hetta var samstundis ein søguligur dagur hjá »Farvandsvæsenet« í Føroyum, við tað at liðin eru 110 ár, síðan tann størri vitin bleiv bygdur í 1893, og Svenning bleiv seinasti vitapassarin við førstum tilknýti til vitarnar á Borðuni. Vitarnir eru automatiseraðir og fólk frá Farvandsvæsenet hava eftirlit og viðlíkahald um hendur.

Svenning, sum bleiv 67 ár tann 25. juli 2003, er nólsingur, sonur Margrethu, f. Holm, og Sofus Lindenskov, bæði úr Nólsoy. Pápin doyði av tuberklum, tá Svenning var eitt ára gamal.

Svenning bleiv settur í starv á vitanum á Borðuni í 1966. Tey fyrstu trý árini sum útkiksmaður, seinni fekk hann ábyrgdina av postflutninginum til vitarnar, samstundis sum hann gekk vakt við vitarnar. Í 1978 bleiv hann sáttmálasettur, tá Poul Niklái Thorkildshøj legði frá sær fyri aldur, og í 1981 bleiv hann settur í starv sum tænastumaður. Svenning hevur ikki tal á øllum túrunum, hann hevur gingið millum bygdina í Nólsoy og vitarnar, hesi 37 árini hann hevur starvast har. Túrurin er umleið 8 kilometrar og tekur tað millum ein og tveir tímar at ganga í góðum veðri, onkran ringan vetrardag hevur túrurin tikið upp til fimm tímar.

Í sambandi við at Svenning fór frá, skipaði Farvandsvæsenet fyri eini samkomu í Fýrmeistarahúsunum á Borðuni, saman við starvsfeløgum frá øðrum vitum í Føroyum og skrivstovustjóranum.

Svenning er giftur við Bernhild, f. Nielsen, úr Nólsoy. Tey eiga tríggjar døtur, Heininu, sum býr í Havn, Elisabeth, sum býr í Kvívík, og Sólbjørg, sum býr í Miðvági.

## Atli Hansen 60 ár



Sunnudagin 3. august fylti Atli Hansen í Fuglafirði 60 ár. Hann er sonur Kristionnu Hammer av Eiði og Hans David Hansen í Fuglafirði.

Hann tók læraraprógv í Havn í 1966, var lærari í Lorvík til 1971 og hevur verið lærari í Fuglafirði síðani. Hann hevur verið talu- og hoyrilærari og ráðgevari fyri Sernámsfrøðiligu Ráðgevingina hjá Landsskúlafyrisitingini síðani 1987. Hann var á árskeiði í tónlist á Danmarks Lærerhøjskole 1974-75, tók prógv sum serlærari í 1986 og talu- og hoyrilærari árið eftir.

Atli er tónleikari og spældi sum ungur í popporkestri. Hann er giftur við Inger Kristinu Heilberg úr Helsingør.

## Uni Dahl vann kappingina



*Uni Dahl vann kappingina hjá Plattform og Mærsk Air*

*Mynd: Maria Olsen*

Í samstarvi við Mærsk Air hevur Plattform í Havn skipað fyri eini spurnarkapping á teirra heimasíðu. Vinningurin var ein ferð við Mærsk Air, Vágar - Keypmannahavn og retur. Vinnarin í hesi kapping gjørdist Uni Dahl í Havn.

Hølini hjá Plattform verða brúkt til ymiskum tiltøk, so sum t.d. mótaframsýningar, veitslur, skeiðvirksemi, brúdleyp og diskoteque. Køkurin er sera væl útgjørdur, og matur verður eisini sendur út av húsinum.

Tað er Havgrímur Johannesen í Havn, sum eigur og rekur Plattform. Tvey og eitt hálvt fólk eru í føstum starvi, meðan eini 50 fólk arbeiða í ymiskum vaktum.

## Poul Nolsøe 60 ár



Í dag, 5. august, fyllir Poul Nolsøe í Havn 60 ár. Hann er føddur á Sandi, sonur Kristinu Samuelsen úr Sumba og Ansgar Nolsøe av Tvøroyri. Han tók læraraprógv í Havn í 1966, var lærari í Klaksvík til 1977, í Julianehåb í Grønlandi 1978-79, var serlærari í Århus í tvey ár og síðani serlærari í Norðoyggjum.

1968-69 var hann á árskeiði á Danmarks Lærerhøjskole í støddfrøði og alisfrøði og tók serlæraraútbúgving á hesum háskúla í 1978.

Poul er giftur við Mallu Thorsteinsson úr Klaksvík.

## Dagurin

**5. august. Ásvaldur,** deyður í 642. Enskur kongur, sum var sera ágrýtin í trúboðaravirki í landi sínum. Millum annað bygdi hann á oynni *Holy Island* við landnyrðingsstrond Onglands kleystrið Lindisfarne, ið víkingar løgdu í oyði í árinum 793. Ásvaldur fell í einum bardaga við heidna kongin Mercia.

Navnið, ið er gamalt enskt, merkir *Guð ræður.*


**AT VELJA PRENTSMIÐJU OG TIMBURMANN ER NAKAÐ TAÐ SAMA**

Tit vilja hava fatur á tí besta handverkaranum, honum, tit kunnu hava álit á, einum meistara, ið ikki leggur eykarokning oman á eykarokning. Einum, sum kemur tann dagin, hann hevur lovað og verður liðugur tann dagin, hann hevur lovað.

Ljóðar hetta sum eitt brot burtur úr „Sagnum og ævintýrum“?

Á Hestprent smíða vit ikki hús, men vit gera alt grafiskt arbeiði.
Tað vil siga uppseting, prent og innbinding.

Tín prentlutur er í góðum hondum hjá okkum.
Hestprent gongur nú á tjúgunda ári, og eru vit vaksin til 20 starvsfólk.

Vilt tú vita meira, hava vitjan av sølumanni okkara, ella hava eitt tilboð sendandi, so eru vit altíð til dystin fús

HESTPRENT
Dvørgastígur 7
Postsmoga 3118
110 Tórshavn
Tel: 314555 • Fax: 318 026
t-post: hestoy@hestprent.fo